miðvikan

Nr. 86 • 06. mai 2009

**Siðsøguligt tilfar**
í Sosialinum mikudagar



**Steingrim Kristoffersen:**

# Hoyri enn seinastu orðini hjá pápa fyri mær

**Í hesi røðini um vanlukkuna fyri 75 árum síðani, tá ið Neptun og Nólsoy gingu burtur, hava vit hesa ferð samrøðu við Steingrim Kristoffersen, son skiparan á Neptun, Óla Jákup. Í hesum partinum greiðir hann frá tíðini, tá ið hann misti pápan**



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

**4. partur**

Heima hjá pápa vóru tey átta systkin, fimm beiggjar og tríggjar systrar. Tey vóru úr Ísakshúsi, sum tað kallaðist. Foreldrini vóru Grækaris í Skálum, sum var ættaður úr Gásadali og Anna Margreta, sum var ættað av Skælingi.

So hendi tað, at tey mistu mammuna í 1897. Tá sat abbi eftir við átta børnum. Onkur av teimum vóru tó tilkomin. Elias fór so til Sandavágs at vaksa upp hjá fastur síni. Pápi okkara fór oman at vera á Mørk í Vestmanna, har pápasystirin var gift. Har var hann so, til hann var tilkomin.

Pápi giftist so við Helanna f. Joensen, sum var ættað úr Útistovu í Hvalvík. Vit blivu átta systkin, seks brøður og tvær systar. Pápi fór til skips sum aðrir menn. Hann fór við Doru í 1905. Teir, sum áttu Doru, vóru beiggjarnir hjá honum Tummas, Kristoffur og Pól og so tveir aðrir menn.

Pápi tók skiparaprógv hjá Jens í Dali í 1912. Í 1913 fór hann at føra Doceu hjá Vága Kristoffur. Í 1914 fór hann við enskum trolara Fizenta sum Christian Evensen stóð fyri.

Í 1915 fór hann aftur sum skipari við Doru fyri beiggjan Kristoffur.

Í 1917 var hann skipari á Mary Boyes. Hetta var undir 1. heimsbardaga, og tá kom pápi út fyri eini serligari hending.

Bretar kravdu hesa tíðina, at føroysku skipini landaðu sín fisk í Bretlandi til ásettan prís. Men í Noregi fekst dupult so nógv fyri fiskin, og fleiri tóku kjansin at fara kortini.

Hetta vildu bretar ikki lata sær lynda og vildu fyribyrgja hesum. Teir seta fólk umborð á Mary Boyes at noyða teir til Stornoway at landa fiskin.

Tá ið teir fara aftur til Føroyar úr Stornoway verða teir steðgaðir av týskum kavbáti. Tá ið tað kemur fram, at teir hava landað fiskin í fíggindalandinum Bretlandi er skipið deyðadømt, og tað verður søkt, eftir at manningin er sloppin í bátarnar. Teir høvdu 52 tímar til lands.

Í 1918 førdi pápi Guiding Star, og í 1919 og 1920 førdi hann Fram. Hann var heima í 1921 og førdi so aftur Doru í 1922.

## Pápi verður burtur

Pápi keypti Neptun í 1923. Teir blíva so burtur í 1934. Tá kom mamma at sita einsamøll við okkum átta. Eg var elstur, 12 ára gamal, yngstur var Trygvi, sum var eitt ára gamal.

Pápi hevði tosað við læraran um, at eg skuldi fara at ganga í realskúla árið fyri, at teir fórust. Men eg segði so kortanei. Eg ætlaði mær ongan veg at fara til Havnar at ganga í skúla. Eg havi seinni hugsað um, hvussu tað hevði verið vorðið, um eg gekk í Havn tá. Eg var hóast alt frægastur at vera heima, tí eg var elstur. Næsti beiggin Kristoffur fór so í staðin fyri. Pápi kendi so væl Richard Long, sum var lærari við realskúlan og seinni kendur sum landsstýrismaður. Kristoffur kom at búgva hjá Richardi.

Tað, sum eg minnist í samband við Neptun, var, at vestmannaskipið Dora, sum var deyðsiglari, skuldi hava motor sama árið, sum hon gekk burtur við allari manningini í 1931. Motorurin var komin til Vestmanna, men Dora kom ikki aftur. Motorurin var so standandi. Hann stóð í 1932. Hann stóð eisini í 1933. Tá varð avgjørt, at Neptun skuldi skifta motor, og teir skuldu fáa motorin hjá Doru, sum var størri enn tann, teir høvdu. So fóru teir veturin 1933/34 at seta motorin í Neptun. Teir fingu eisini eina nýggja mesanmastur (aftasti mastur á skipi.)

Eg var ofta umborð, meðan hetta arbeiðið gekk fyri seg. Men sum ofta er við tílíkum arbeiði, dró tað út. Eg minnist, at eg var eitt sindur illa tilfriðs, tí teir vóru so seinir avstað. Eg helt tað vera skomm, at Neptun skuldi vera seinasta skip at fara til fiskiskap. Hetta helt eg eisini fyri við ein mann. Hann svaraði, at hetta var tí, at teir høvdu skift motorin og mastur. Hetta var so ein frágreiðing, sum var nóg góð fyri meg.



*Óla Jákup mátar positiónina. Hann var kendur sum ein skilamaður*